# BILAR

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800



Citroën Jumpy



Peugeot Expert



Fiat Scudo

# Van of the Year 2008




*Ársins vørubilar 2008 f.v.: Fiat Scudo, Citroën Jumpy og Peugeot Expert*

**Vørubilarnir Citroën Jumpy, Peugeot Expert og Fiat Scudo eru kosnir ársins vørubilar í Evropa 2008**

BILAR

Ein dómsnevnd av journalistum úr 20 evropeiskum londum hevur kosið teir tríggjar vørubilarnar: Citroën Jumpy, Peugeot Expert og Fiat Scudo sum ársins vørubilar í Evropa 2008. Bilarnir verða framleiddir í Fraklandi sum samstarv millum PSA (Peugeot Citroën) og Fiat.

Grundgevingarnar fyri júst at geva hesum trimum bilum heiðurin sum "Van of the Year 2008" vóru t.d. at teir eru sera væl innrættaðir og arbeiðsligir, umframt at teir eru komfortablir. Hóast teir bera vektina væl, eru koyrieginleikarnir sum á einum persónbili.

Citroën Jumpy, Peugeot Expert og Fiat Scudo fáast í tveimum ymiskum hæddum og aksilfrástøðum við vørurúmi frá fimm til sjey rúmmetrar og teir lasta millum 1.000 og 1.200 kg.

Vørubilarnir fingu eisini góðan karakter fyri sínar innbygdu trygdarskipanir og umhvørvisvinarligu motorar.

**mg**




# Ellisakfør nýtt limablað

**»Tíðindaskrivið Ellisakfør« er heitið á nýggja limablaðnum hjá áhugafelagnum Føroya Ellisakfør.**

Í blaðnum eru áhugaverdar greinar um tiltøk felagsins sum t.d. túrar við bilum og motorsúkklum bæði í Føroyum og uttanlands.

Síðan Føroya Ellisakfør varð stovnað fyri 15 árum síðan, hevur felagið givið út limabløð. Fyrstu árini var heitið á blaðnum »Tíðindaskrivið Ellisakfør« í A5 stødd. Í 2003 skifti blaðið form og varð til eina avís í tabloid støðd (A3) og fekk navnið »Hjólið«. Nú er so blaðið aftur í upprunaligu støddini.

Í nøkur á hevur limablaðið hjá Føroya Ellisakførum verið at fingið til keyps á Shell-støðunum kring landið, men nú er tað eitt limablað burturav og verður bert sent út til limirnar.

Nevndin hevur sett sær sum mál at geva út tvey limabløð um árið.

Formaður í felagnum er Eirikur Ó. Simonsen, næstformaður er Hans Korsgaard, Páll Danielsen er skrivari, Hans Jákup Michelsen er kassameistari og Finn Jespersen er nevndarlimur. Eykalimir eru John Christiansen og Búgvi Apol.

**mg**